# 20

FØROYA TELE

# 5 ára yvirlit – konsern

| Mió kr. | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | | |
| Inntøkur tilsamans | 389 | 385 | 380 | 488 | 500 |
| Bruttoúrslit | 205 | 206 | 208 | 260 | 258 |
| Úrslit áðrenn avskrivingar (EBITDA) | 102 | 109 | 114 | 135 | 128 |
| Úrslit áðrenn rentur (EBIT) | 35 | 40 | 50 | 68 | 60 |
| Ársins úrslit | 31 | 33 | 48 | 51 | 44 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Støðisogn | 579 | 515 | 519 | 545 | 582 |
| Íløgur í materiella støðisogn | 115 | 58 | 54 | 30 | 68 |
| Íløgur í immateriella støðisogn | 11 | 10 | 7 | 5 | 9 |
| Ogn í umferð | 187 | 196 | 212 | 213 | 203 |
| Ogn tilsamans | 766 | 711 | 730 | 759 | 786 |
| Eginpeningur | 530 | 533 | 534 | 506 | 476 |
| **Peningastreymur** | | | | | |
| Frá rakstri | 72 | 89 | 112 | 119 | 113 |
| Frá íløgum | -126 | -68 | -36 | -29 | -91 |
| Frá fígging | 24 | -32 | -15 | -74 | -38 |
| Broyting í tøkum peningi | -29 | -10 | 61 | 16 | -16 |
| Fríur peningastreymur | -53 | 21 | 77 | 90 | 22 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| EBITDA í mun til sølu lutfall | 26,1 | 28,3 | 30,1 | 27,6 | 27,0 |
| Rakstraravkast | 9,1 | 10,5 | 13,1 | 13,9 | 12,1 |
| Ognaravkast | 4,6 | 5,7 | 6,8 | 8,9 | 7,7 |
| Gjaldførisevni | 224,5 | 235,3 | 238,9 | 179,2 | 173,6 |
| Trygdarevni | 69,2 | 74,9 | 73,2 | 66,7 | 60,6 |
| **Aðrar upplýsingar** | | | | | |
| Starvsfólk (ársverk) | 183 | 179 | 178 | 249 | 246 |
| Inntøkur fyri hvørt starvsfólki (mió. DKK) | 2,128 | 2,149 | 2,135 | 1,961 | 1,932 |
| Úrslit fyri hvørt starvsfólk (mió. DKK) | 0,170 | 0,186 | 0,270 | 0,203 | 0,177 |

Allar upphæddir eru í mió. kr.

| | | |
|---|---|---|
| Rakstraravkast | = | (úrslit áðrenn rentur x 100)/inntøkur |
| Ognaravkast | = | (úrslit áðrenn rentur x 100)/ogn tilsamans |
| Gjaldførisevni | = | (ogn í umferð x 100)/stuttfreistað skuld |
| Trygdarevni | = | (eginpeningur, íroknað minnilutaeigarar x 100)/ogn tilsamans |

# INNIHALDSYVIRLIT

EITT SAMTAK, IÐ STENDUR SAMAN ..... 2
FØROYA TELE SAMTAKIÐ ..... 2
KAPPINGIN UM KUNDAN ..... 3
TELEVARPIÐ SELUR TIL ÚTHEIMIN OG VARÐVEITIR KUNDAN ..... 4
OKKARA HEIMSKLASSANET ..... 5
UNDIRSTØÐUKERVIÐ ..... 5
SAMBAND ÚT Í HEIM ..... 6
SAMANUMTØKA ..... 8
VÁÐASTÝRING ..... 9
UMHVØRVISÁBYRGD ..... 10
VITANARTILFEINGI ..... 10
SAMFELAGSÁBYRGD ..... 10
BÚSKAPARÁRIÐ ..... 11
ÁTEKNING LEIÐSLUNNAR ..... 13
GRANNSKOÐANARÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA ..... 14
RAKSTRARROKNSKAPUR ..... 17
FÍGGJARSTØÐA ..... 18
PENINGASTREYMSYVIRLIT ..... 20
NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR ..... 27
NEVND & STJÓRN ..... 32

# UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

Skrásetingarnavn: P/F Telefonverkið
Skrásetingarnr.: 2697
Hjánavn: Føroya Tele
Bústaður: Klingran 1-5, Hoyvík
Heimstaðarkommuna: 100 Tórshavn

Heimasíða: www.ft.fo
Teldupostur: ft@ft.fo
Telefon: +298 303030

# EITT SAMTAK, IÐ STENDUR SAMAN

Í 2020 vendi heimurin á ranguni. Korona setti sín avgjørda dám á árið, og vit tóku tilmælini til okkara og umløgdu alt arbeiðið í samtakinum í somu løtu, sum almennu myndugleikarnir settu Føroyar niður í ferð. Korona skuldi berjast niður, og tað eydnaðist okkum at tryggja minst møguliga órógv á veitingar til kundan í 2020. Korona lærdi okkum nógv, tí hon lýsir væl týdningin av einum góðum og landsumfatandi far- og breiðbandsneti. Hagtølini sanna, at breiðbandið, farnetið og fartelefonin gjørdust grundarlagið undir afturlatna samfelagnum, tí ongantíð fyrr hava vit tosað so nógv í telefon og arbeitt so nógv á netinum sum í 2020. At fjarskiftisnetið er neyvstillað og 100% fyrireikað til at bera vaksandi ferðslu, er í samljóð við tørvirnar og treytirnar fyri at kunna virka í einum nútíðar samfelagi sum okkara.

## FØROYA TELE SAMTAKIÐ

Aðalmálið er at knýta saman Føroyar og fólkið, ið her býr, í eina betri framtíð. Tað er gjøgnum starvsfólkini, at vit náa hesum máli. Vit arbeiða miðvíst við at skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har starvsfólk trívast, eru motiverað og mennast í samsvari við ásett mál fyri samtakið. Í 2020 setti korona dagsskránna, men vit lagaðu okkum eftir umstøðunum og kundu enn eina ferð ásanna, at vit hava ein starvsfólkahóp, sum tekur ábyrgd og stendur saman.

Eitt felagsíkast frá øllum deildum og feløgum tryggjaði, at nógv av settu málunum blivu nádd gjøgnum árið. Vit handaðu løgregluni nýggju samskiftis-skipanina KIMA, upplivdu eitt nøktandi tal av kundum, ið valdu at uppstiga til størri hald, og gjøgnumførdu Hronn-verkætlanina í Norðsjónum, hóast korona hevði neiliga ávirkan á aðrar veitingar og verkætlanir í frálandavinnuni.

Við ársbyrjan herjaði illveður og gjørdi skaða á sjókaðlar, ið liggja millum oyggja. Skaðarnir høvdu við sær órógv á breiðbandstænastur, men umvælingin gekk væl. Sambondini vórðu uppstigað og radiolinkar settir upp fyri at tryggja ferðsluna, um tílík brek henda aftur.

Gerandisdagurin í samtakinum varð í stóran mun broyttur í 2020 vegna koronu. Tá ið almennu myndugleikarnir á vári settu herdu, landsumfevnandi átøkini í verk, hildu vit staðiliga fast um samlík átøk innanhýsis í øllum bygningum kring landið. Avmarkingarnar høvdu við sær, at stórur partur av orkuni varð lagdur í innanhýsis verkætlanir við eitt nú at seta í verk talgilda skipanarskiftið, nútímansgera heimasíðu við nýggjum sniði, menna nýggjan nethandil og greiða úr hondum eitt fullfíggjað, nýtt virðisgrundarlag fyri samtakið.

Ætlanin er framhaldandi at leggja spírar undir nýggjar vinnumøguleikar og samstørv, umframt at vit hyggja út um landoddarnar. Talgilda skipanarskiftið, sum Føroya Tele samtakið setti sjøtul á í 2019, er komið væl ávegis og hevur til endamáls at nútímansgera stórar partar av KT-umhvørvinum. Umskiftið er til frama fyri kundar og starvsfólk og er ein liður í at framtíðartryggja samtakið.

### ÚRSLITIÐ Í 2020

Samanumtikið hilnaðist árið rímiliga væl, hóast korona og illveður høvdu týðandi ávirkan á raksturin og virksemið hjá samtakinum. Nettosølan fyri samtakið gjørdist 389 mió. kr., ið er 4,7 mió. kr. meiri enn í 2019 og ájavnt við málið fyri 2020.

Samlaði rakstrarkostnaðurin fyri 2020 var 185 mió. kr. samanborið við 179 mió. kr. árið fyri. Økti rakstrarkostnaðurin stavar í størsta mun frá útreiðslum til umvæling

av millumoyggja sjókaðlum, ið fingu skaðar av illveðri í fyrsta ársfjórðingi av 2020. Broytt sølusamanseting og øktir ráspprísir fyri sjónvarpstænastur økja somuleiðis um rakstrarkostnaðin.

Rakstraravlopið eftir avskrivingar gjørdist 35 mió. kr. samanborið við 40 mió. kr. í 2019. Úrslitið eftir skatt gjørdist 31,2 mió. kr., sammett við 33,3 mió. kr. árið fyri.

## KAPPINGIN UM KUNDAN

Í 2020 var kappingin á marknaðinum hørð, hóast vit høvdu ein støðugan marknaðarpart. Ígjøgnum árið vaks talið av føstum mánaðarligum fartelefonhaldum, og vit vunnu eisini eitt nøktandi tal av nýggjum fartelefonhaldum. Nýggjur kappingarneyti kom á føroyska telemarknaðin við ársenda 2020. Seinastu mongu árini hevur Føroya Tele lagt lunnar undir føroyska telemarknaðin við at bjóða kundum dygdargóðar tænastur, sum hava havt við sær støðugt lækkandi prísir fyri kundan. At tríggir veitarar nú eru á fartelefonmarknaðinum skapar umstøður fyri góðari og sunnari kapping.




## TÆTT AT KUNDANUM

Sølan í Telebúðunum eydnaðist væl í 2020. Vit upplivdu ein vøkstur í søluni samanborið við árið frammanundan, hóast korona ávirkaði raksturin í Telebúðunum nakað í øðrum ársfjórðingi.

Við tí endamáli at verja starvsfólk og kundar vórðu almennu tilmælini hildin við at skerja upplatingartíðirnar í Telebúðunum. Hóast skerdar upplatingartíðir var sølan hesa tíðina ájavnt við søluna árið fyri. Telefontænasta og support varð uppraðfest, soleiðis at kundar fingu avgreitt fyrispurningar, og fjarskiftið virkaði somuleiðis ómakaleyst til fyrimunar fyri tey mongu, ið arbeiddu heimanífrá hetta tíðarskeiðið.

Áhaldandi dentur verður lagdur á at møta kundanum, har kundin er. Vit hava seks Telebúðir kring landið, og hetta gevur bæði privat- og vinnukundum møguleika at keypa vørur og fáa eina nærlagda tænastu í nærumhvørvinum. Í apríl 2020 flutti Telebúðin í Havn úr miðbýnum og inn í sølumiðstøðina SMS. Nýggja staðsetingin ger tað lættari hjá kundum at koma í Telebúðina, bæði til gongu og í bili. 2020 var somuleiðis árið, tá ið nýggjur nethandil læt upp. Nethandilin er eitt gott ískoyti til viðskiftafólk, sum vilja avgreiða ørindi á netinum og fáa vørur beint til dyrnar.

## TÆNASTUPALLAR

Vit vilja áhaldandi skapa fult gjøgnumskygni fyri kundarnar og gera tað lætt hjá kundum at avgreiða síni viðurskifti á netinum. Ver hevur meir enn seks ár á baki, og eisini í 2020 varð slóðað fyri at veita kundum okkara trygt og gott samskifti. Ver er her, tí tað skal vera lætt at vera kundi, og í 2020 gjørdist tað eitt nú møguligt hjá kundum at brúka nýggjar gjaldsmøguleikar til Ver-hald.

Mítt Ver appin varð dagførd við nýggjum sniði, og sjálvgreiðslan víðkaðist til eisini at fevna um tænastuna Skíggjafrí. Tænastan ger tað lætt hjá Ver-kundum at umsita skíggjatíðina í húsarhaldinum bæði á breiðbandi og farneti. Millum annað kunnu foreldur lætt og ómakaleyst stýra skíggjanýtsluni hjá børnunum. Appin er tøk á føroyskum og enskum, og kundar tóku væl ímóti henni. Appin verður

áhaldandi ment til at fevna um viðkomandi tænastur og nýggjar møguleikar.

Vinnurúmið er sjálvgreiðslan hjá vinnuni. Tænastan verður støðugt ment, og endamálið er framhaldandi at hækka tænastustigið í Vinnurúminum, soleiðis at tænastan lættir um nýtsluna og gevur enn greiðari yvirlit hjá einstaka brúkaranum.

## KIMA

Á vári 2019 vunnu vit útboð hjá Ríkispolitinum um at veita Føroya Politi eina nýggja samskiftisskipan. Skipanin skuldi fylgja "Mission Critical Push-to-Talk" trygdarkrøvum, og endaliga loysnin varð at byggja skipanina oman á landsumfatandi farnetið. Skipanin, ið hevur fingið heitið KIMA, varð liðugt ment í fyrru hálvu av 2020, og skipanin varð koyrd í rakstur og handað í desember 2020.

KIMA er ein slóðbrótandi skipan, sum er millum tær fyrstu av sínum slag í øllum heiminum. KIMA hevur allar hentleikar, tá ið tørvur er á títtum, stuttum og tryggum samskifti. KIMA er ment í samstarvi við Ericsson, og hon hevur óteljandi møguleikar. Við tíðini er málið at knýta alla tilbúgvingina saman, so at tey, ið tæna og ansa eftir okkum borgarum, kunnu veita eina enn betri tænastu.

Skipanin ber brá av miðvísum arbeiði og er gott dømi um samstarv, ið riggar, tá ið partar við lyklastøðum finna felagsstevið og saman skapa spennandi og slóðbrótandi úrslit. Umframt løgregluna knýttu aðrir stórir aktørar seg í skipanina fyri ársenda 2020.

## SONA

Sona byrjaði sum ein verkætlan í november 2017, og í dag er appin í nærum hvørjum lumma í Føroyum. Sona er største app í Føroyum, og hagtøl staðfesta, at kundar hava tikið tænastuna til sín. Við ársenda 2020 var Sona appin tikin niður oman fyri 32.000 ferðir, og í miðal 20.000 leitingar vóru dagliga á appini og heimasíðuni www.sona.fo.

Við støði í teimum avmarkingum, sum korona setti gjøgnum árið eitt nú viðvíkjandi frástøðu, gav Sona okkum møguleika at luttaka á landsumfatandi heilsuátøkum í tryggari frástøðu. Í samstarvi við ÍSF og Fólkaheilsuráðið varð eitt nú skipað fyri átøkunum "Rørsla í Føroyum" og "Hvør metur telur", har øll hvør sær høvdu møguleika at luttaka og samstundis røra seg undir víðum lofti.

Bæði heimasíðan og appin vórðu í 2020 dagførdar við nýggjum sniði, betri leitifunkum og við møguleika fyri víðkaðum leitingum, ið góvu enn fleiri møguleikar. Í 2020 var eitt av hæddarpunktunum, at Sona flutti seg frá einans at vera fyri lokalar busskipanir til nú at fevna um landsumfatandi bussleiðir í samstarvi við Strandfaraskip Landsins.

# TELEVARPIÐ SELUR TIL ÚTHEIMIN OG VARÐVEITIR KUNDAN

Televarpið varðveitir framhaldandi kundaskaran, og alsamt fleiri kundar leggjast aftur at største pakkanum, har ið ítróttur við eitt nú Betri Deildini hjá monnum er at síggja. Sum úrslit av, at Føroyar tíðliga á vári 2020 fingu tamarhald á farsóttini, gjørdist Betri Deildin fyrsta fótbóltsdeildin í vesturheiminum, sum fór at spæla fótbóltsdystir aftur.

Í hesum sambandi seldi Televarpið sjónvarpsrættindini til 12 tey fyrstu umførini av kappingarárinum 2020 til norskar sjónvarpsveitarar, sum seldu dystirnar víðari til veddingarfyritøkur.

Ætlanin er at halda fram við góða samstarvinum í 2021.

Arbeiðið hjá Televarpinum at varðveita vaksandi kundatalið og at styrkja kappingarstøðuna hjá Televarpinum mótvegis útlendsku innihaldsveitarunum heldur fram. Arbeitt verður framhaldandi við at menna føroyskt sjónvarpstilfar og nýggjar tænastur, eins og rásvalið verður tillagað eftir tørvi. Næsta stig í tilgongdini er arbeiðið at gera avtalur við viðkomandi samstarvsfelagar í føroyska ítróttarheiminum við tí endamáli at vísa føroyskan ítrótt beinleiðis í Televarpinum.

Umframt harða kapping frá nýggjum stroymingartænastum ger nútímans tøkni tað alsamt lættari hjá pirat-útbjóðarum at vera virknir á føroyska marknaðinum. Tá ið slíkt virksemi verður uppdagað, meldar norðurlendski felagsskapurin Nordic Content Protection málið til løgregluna, sum í samstarvi við Rettighedsalliancen tekur sær av málunum.

## OKKARA HEIMSKLASSANET

Føroya Tele hevur eitt av heimsins bestu farnetum. Eitt farnet sum okkara skal kunna bera vaksandi ferðslu, lúka nútímans krøv og lúka tørvin hjá tí einstaka. Tað er við hesum í huga, at farnetið áhaldandi verður útbygt og fínstillað, so at øll kunnu taka ómakaleyst samskifti sum givið, sama hvar í landinum vit eru stødd. Korona setti ferð á fartelefonina í 2020, og í afturlatna samfelagnum hittust vit fyrst og fremst á netinum ella í telefonini. Ongantíð fyrr hava vit tosað so nógv í telefon og verið so nógv á netinum við fartelefoni sum í 2020. Metið ber vitnisburð um eitt farnet, sum ikki hóraði undan, men harafturímóti tryggjaði føroyingum og føroyska vinnulívinum framkomnar samskiftismøguleikar, tá afturlatna samfelagið hevði tørv á tí.

Langtíðarætlanin við 100% geografiskum dekningi gongur framá. Vit gera serloysnir, sum nøkta tørvin hjá einstaka kundanum. Hetta hevur við sær, at vit í samstarvi við kundan ganga á odda at finna loysnir, ið hóska einstaka kundanum. Í 2020 veittu vit nýggjar vinnuligar loysnir og arbeiddu eitt nú við lokalum dekningi til skúlar og hotell. Eitt nú løgdu vit farnet inn á nýggja Skúlan á Fløtum. Tá ið Eysturoyartunnilin læt upp stutt undan jólum, vóru fipur og antennur klár, soleiðis at farnetið hjá Føroya Tele eisini riggar 187 metrar undir sjóvarmálanum. Tað er umráðandi, at vit kunnu veita samband allastaðni, og hetta var eisini eyðsæð, tá ið vit vunnu útboðið um at veita KIMA til løgregluna.

Farnetið er til reiðar til 5G, men útrullingin er ikki farin av bakkastokki enn. Í sambandi við víðari útbygging av farnetinum varð 5G-tøkni roynd í 2020, hóast endaligi veitarin av 5G-netinum ikki er valdur enn.

Íløgan í eitt 5G-farnet er stór, og avgerðin krevur serlig atlit, ið verða viðgjørd skynsamt. Í 2020 arbeiddu leiðsla og nevnd saman fyri at nærlýsa og greina 5G-tøknina, viðkomandi veitarar og vinnuligar møguleikar. Viðgerðin tekur tíð, og eingin endalig avgerð um veitara verður tikin, fyrr enn vit meta, at nøktandi grundarlag er fyri hesum.

## UNDIRSTØÐUKERVIÐ

Endamálið hjá NET er at røkja og menna eitt so sterkt, skjótt og nútíðarhóskandi undirstøðukervi, sum yvirhøvur ber til, umframt at selja nettænastur til allar fjarskiftisveitarar undir javnbjóðis treytum.

Við ársenda 2018 fór stóra verkætlanin at leggja fipur út til øll húsarhald av bakkastokki. Verkætlanin varð mett at taka millum fimm og sjey ár, og málið er at

leggja eitt landsumfatandi fipurnet, sum fer at kollvelta samskiftistøknina, vit kenna á breiðbandsøkinum í dag. Hóast fleiri býarpartar í Havn og smærri bygdir longu eru knýtt upp í nýggja fipursambandið, hava ávís viðurskifti gjørt, at verulig ferð ikki kom á ætlaðu útbyggingina fyrr enn í 2020.

Í februar 2020 varð avtala gjørd við undirveitara um veiting av serútgerð og samstarv at leggja fipurnet. Partarnir samdust í fyrsta umfari um at gera eina royndarverkætlan, ið hevði við sær, at fipurkaðlar vórðu lagdir inn í hvørt húsarhald í Kvívík. Royndarverkætlanin var umfatandi og eydnaðist væl í tann mun, at NET nú, við royndum og lærdómi frá royndarverkætlanini, er til reiðar at seta ferð á útbyggingina kring alt landið.

Verkætlanin at leggja fipur til heimið fer væntandi at fylla stóran part av arbeiðnum hjá NET komandi árini.

### ÚTBYGGINGAR OG DAGFØRD TØKNI

Í 2020 vórðu útbyggingar gjørdar samsvarandi við stóra vøksturin í data-nýtslu. NET fer áhaldandi at útbyggja undirstøðukervið við fipursambondum til fartelefonstøðir og uppseta nýggjar mastrar til veitarar.

Komandi árini verður neyðugt at nútímansgera tøknina, sum veitir fastnettelefontænastur, og harvið gera tað møguligt hjá kundum, ið hava fipur-samband, eisini at hava fastnettelefon.

2020 fekk eina buldraliga byrjan, tá ið illveður herjaði og gjørdi skaða á sjókaðlar, ið liggja millum oyggja. Ringa veðrið gjørdi skaða á báðar sjókaðlarnar, ið liggja ávikavist millum Vágar-Suðuroy og Streymoy-Sandoy. Tá ið viðraði, eydnaðist tað at umvæla ein part av skaðunum eftir stuttari tíð og seinasta skaðan á heysti. Umvælingarnar av skaðunum, ið stóðust av illveðrinum, vóru kostnaðarmiklar og høvdu munandi negativa ávirkan á úrslitið hjá NET í 2020.

Stóru skaðarnir ávirkaðu breiðbands-tænasturnar í Suðuroy og Sandoy, og fyri at tryggja betri samband á oyggjunum vórðu luftbornu sambondini uppstigað og radiolinkar settir upp, soleiðis at tey klára at bera ferðsluna, um tílík brek henda aftur. Mett verður, at luftbornu sambondini nú megna at bera ferðsluna fram til 2023 við verandi vøkstri í datanýtsluni.

Tað var ikki einans á sjógvi, men eisini á landi, at illveður gjørdi um seg. Í februar 2020 fór stórt umvælingararbeiði í gongd, eftir at toran gekk í Vágum. Ógvisliga toran elvdi til stóran skaða og legði stóran part av undirstøðukervinum í økinum lamið. Nógv útgerð mátti skiftast út og stórt umvælingararbeiði gerast, og talan var um arbeiði, ið strekti seg heilt frá el-skápi í Sørvágsbygd og niðan í tøknihús uppi á Skeiðini oman fyri bygdina.

## SAMBAND ÚT Í HEIM

Shefa hevur til endamáls at tryggja sambandið út í heim, og í 2020 stóðu útlendskir kundar í donskum og bretskum sjóøki fyri á leið 70% av virkseminum hjá Shefa.

Tað eru sløk 14 ár síðani, at Føroya Tele setti P/F Shefa á stovn, og Shefa tók sjókaðalin Shefa-2 í nýtslu. Fyrstu átta árini var raksturin sera tungur, og eginogn felagsins fall niður um ein triðing. Høvuðsendamálið hjá Shefa var og er framvegis at veita Føroyum samband til útheimin. Frá byrjan hevur tó verið arbeitt miðvíst við at vinna kundar uttanlands, og tað er júst virksemið uttanlands, sum er høvuðsorsøkin til, at raksturin hjá Shefa vendi og gjørdist positivur í 2015.

Í dag er gott, støðugt og álítandi samband ein fortreyt fyri, at fyritøkur og fólk í Føroyum kunnu avgreiða síni gerandis-viðurskifti. Shefa-2 sjókaðalin, sum Shefa eigur, er saman við íslendska Farice-1 kaðalinum sera týðandi samband við umheimin hjá kundum og fyritøkum í Føroyum. Shefa-2 og Cantat-3 kaðlarnir hava eisini týðandi sambond til frálandavinnuna bæði vestan fyri Hetland og í danska partinum av Norðsjónum. Cantat-3 kaðalin, sum Shefa keypti í 2012, er nú vorðin ov gamal og ótíðarhóskandi til sambandið millum Føroyar og útheimin. Tað verður ikki mett tøkniliga og fíggjarliga ráðiligt at dagføra kaðalin. Í 2021 verður hetta kaðalsambandið niðurlagt. Í staðin verða partar av Cantat-3 kaðalinum brúktir í Halfdan oljuøkinum í Norðsjónum.

Føroya hava sostatt tvey kaðalsambond við útheimin í dag, og tað hevur higartil verið mett nøktandi, tí hesi sambond hava enn nógvan óbrúktan kapasitet. Ísland hevur trý kaðalsambond við útheimin, sum eru Farice1, Danice og Greenland Connect, sum liggur til Grønlands og haðani til Kanada. Men í 2020 tók íslendska stjórnin avgerð um at leggja eitt fjórða samband millum Ísland og Írland, sum íslendska stjórnin fíggjar. Shefa kunnugt er íslendska avgerðin um eitt fjórða samband í størri mun tikin út frá einum trygdarsjónarmiði enn út frá einum kapasitetssjónarmiði.

Eitt triðja samband millum Føroyar og útheimin fer leysliga mett at kosta millum 250 og 400 mió. kr., alt eftir hvør loysn verður vald. Roknað verður ikki við, at íløgan fer at bera seg fíggjarliga, tí nóg mikið av kapasiteti er á verandi kaðalsambondum til útheimin í rúma tíð frameftir. Ein avgerandi fortreyt fyri, at tað var møguligt at leggja Shefa-2 kaðalin í 2005, var, at Føroya Tele var eitt sterkt samtak, sum hevði tøkniligu og fíggjarligu styrkina til at gjøgnumføra verkætlanina. At Føroya Tele framhaldandi er eitt fíggjarliga sterkt samtak, er eisini ein fortreyt fyri at kunna leggja eitt triðja samband. Men spurningurin, um ein íløga skal gerast í eitt triðja samband við útheimin, er eisini ein samfelags-spurningur, sum eigur at verða umrøddur í størri høpi. Shefa fer í næstum at taka stig til hesa umrøðu.

## VERKÆTLANIR OG SAMSTØRV

Í 2019 varð avtala gjørd við oljufelagið Total um at leggja nýtt kaðalsamband til Halfdan-oljuøkið í danska partinum av Norðsjónum, og í 2020 fór arbeiðið í gongd at leggja 220 kilometra langa sjókaðalin, ið hevur fingið heitið Hronn. Sjókaðalin gongur millum høvuðs-skrivstovuna hjá Total í Esbjerg og Halfdan-oljuøkið, og saman við Cantat-3, sum varð knýttur í Tyra-oljufeltið í 2012, skal nýggja sambandið tryggja, at Total hevur eitt trygt og støðugt samband til sítt virksemi í Norðsjónum.

Hóast korona ávirkaði arbeiðið nógv, eydnaðist væl at leggja Hronn kaðalin, og arbeiðið varð liðugt í november. Hóast íløgan bleiv nakað dýrari enn upprunaliga mett, er talan um eitt langtíðarsamstarv, ið tryggjar virksemið í nógv ár fram.

Í 2018 og 2019 lutttók Shefa Telecom í verkætlanini "5G RuralFirst". Bretska stjórnin fíggjaði arbeiðið, sum snúði seg um at byggja eitt 5G-royndarnet í einum útjaðaraøki á Orknoyggjum. Í 2020 fór nýggj royndarverkætlan av bakkastokki, og Shefa Telecom luttekur somuleiðis í henni. Verkætlanin nevnist "5G New Thinking" og er framhald av "5G RuralFirst". Nýggja verkætlanin hevur til endamáls at lýsa nýggjar 5G-møguleikar í sambandi við at gagnnýta frekvensir og at gera opin net til allar farnetveitarar. "5G New Thinking" varð í stóran mun tarnað av koronu. Verkætlanin heldur tó fram í

2021, og eftir ætlan verður Shefa Telecom framhaldandi partur av henni.

Korona ávirkaði virksemið hjá Shefa í 2020. Lækkandi og óstøðugir oljuprísir høvdu sum heild negativa ávirkan á søluna hjá Shefa.

## SAMANUMTØKA

Virksemi og úrslit í 2020 stuðla undir aðalmálini í samtakinum og vísa, at vit ganga á odda í føroyska framburðinum. Korona setti í stóran mun dám á 2020, men sum samtak hevur serstøðan við einari heimsumfevnandi farsótt enn eina ferð staðfest, at vit hava dugnalig og djørv starvsfólk, sum taka ábyrgd og eisini í undantøkustøðum tryggja framburð, og at virksemið og raksturin av fjarskiftis-virkseminum kunnu halda fram ótarnað.

Vit hava eitt av heimsins fremstu farnetum og tryggja framhaldandi føroyingum og føroyska vinnulívinum framkomnar samskiftismøguleikar. Hóast kappingin á kundamarknaðinum hevur verið hørð, hevur hon eydnast væl. Vit fegnast um, at okkara spírar í nýggj, framtíðartryggjað vinnuøkir so sum KIMA og Sona standa í blóma. Somuleiðis halda slóðbrótandi samstørv við føroyskar og útlendskar samstarvspartar fram við at knýta føroyingar í eina betri framtíð og hækka støðið og trygdina hjá kundaskaranum. Fólkið í Føroyum er hjartaslátturin í fyritøkuni, og í 2020 eydnaðist tað okkum at koma enn tættari kundanum og at veita nærlagda tænastu í nærøkinum hjá tí einstaka.

# VÁÐASTÝRING

## ALMENNUR VÁÐI

Føroya Tele er tætt knýtt at føroyska búskapinum, tí størsti parturin av inntøkunum og virkisøkjunum er í Føroyum. Sveiggj í føroyska búskapinum kunnu tí ávirka samtakið. Føroya Tele skal megna at laga seg til umstøðurnar, og arbeiðir tískil støðugt við at minka um allar váðar.

## TØKNILIGUR VÁÐI

Føroya Tele er tætt knýtt at fjølmentari tøkni. Onkrar tøkniligar íløgur kunnu vísa seg ikki at hava ta livitíð, ella kasta ikki tað av sær, ið væntað var. Hetta kann millum annað vera orsakað av skjótari tøkniligari menning, ið ger íløgur ótíðarhóskandi, ella broyttum eftirspurningi frá kundum. Framstig hava negativar avleiðingar, um Føroya Tele ikki heldur seg frammarlaga tøkniliga; serliga samanborið við tey, sum samtakið kappast beinleiðis við.

## INFRASTRUKTURVÁÐI

Føroyar liggja so fjarskotnar í mun til umheimin, at vit hava tørv á tryggum uttanlandssamskifti til evropeiska meginlandið. Hetta hevur við sær, at Føroyar og Føroya Tele hava ein váða í at missa uttanlandssambandið við telefon og data. Føroya Tele eigur tveir undirsjóvarkaðlar út í heim. Shefa-2, sum varð bygdur í 2008, og Cantat-3, sum varð yvirtikin í 2012. Harumframt verður eyka kapasitetur og redundansur keyptur á Farice kaðalinum millum Føroyar, Ísland og Skotland. Sostatt eru trý kaðalsambond tøk, og tað minkar munandi um váðan at missa tele- og datasambandið við restina av heiminum.

## GJALDSOYRAVÁÐI

Føroya Tele samtakið hevur sítt størsta virksemi í Føroyum, og meginparturin av avrokningunum eru í donskum krónum. Av øðrum gjaldoyrum fara gjaldingar fram í evrum, US dollarum og bretskum pundum. Eftir at hava mett um hesar peningaupphæddir og teir váðar, ið knýta seg at hesum, er Føroya Tele komið til ta niðurstøðu, at váðin er avmarkaður.

## RENTUVÁÐI

Samtakið hevur ikki stórvegis váða av rentustøðinum, orsakað av at samtakið onga skuld hevur. Eftir at hava mett um rentuváðan er Føroya Tele komið til ta niðurstøðu, at váðin er nøktandi avmarkaður.

## KREDITTVÁÐI

Samtakið hevur ikki stórvegis váða av einstøkum kundum ella samhandilsfeløgum. Samtakið ansar støðugt eftir skuldarbindingini hjá kundum mótvegis felagnum og somuleiðis við samstarvsfeløgum.

Føroya Tele setur í høvuðsheitum sítt gjaldføri í SIFI fíggjarstovnar í Føroyum og Danmark.

## UMHVØRVISÁBYRGD

Í samsvari við ársroknskaparlógina hevur Føroya Tele orðað ein politikk fyri, hvussu Føroya Tele í sínum virki skal vísa umhvørvisábyrgd. Upplýsingar um umhvørvispolitikk felagsins eru at finna á heimasíðuni www.ft.fo/samfelagstilvit.

## VITANARTILFEINGI

Føroya Tele virkar í eini hátøkniligari vinnugrein, sum krevur, at starvsfólk altíð hava dagførda vitan hvat tøkni og tænastu viðvíkur. Gjøgnum árið hevur felagið áhaldandi ment starvsfólk við venjingum og skeiðum.

Felagið ynskir eisini at draga at sær vælútbúgvin fólk við viðkomandi vitan og førleikum innan virkisøkir felagsins.

## SAMFELAGSÁBYRGD

Í samsvari við ársroknskaparlógina hevur Føroya Tele orðað ein politikk fyri, hvussu Føroya Tele í sínum virki skal vísa samfelagsábyrgd. Upplýsingar um samfelagspolitikk felagsins eru at finna á heimasíðuni www.ft.fo/samfelagstilvit.

## BÚSKAPARÁRIÐ

Hóast avbjóðandi umstøður sum fylgjur av koronu og illveðursskaðum, kann Føroya Tele samanumtikið aftur í ár vísa á eitt nøktandi fíggjarligt úrslit.

### RAKSTUR

Nettosølan hjá samtakinum vaks úr 385 mió. kr. til 389 mió. kr. Vøksturin í søluni stavar í stóran mun frá øktari sølu av telefon- og sjónvarpstænastum, umframt øktari vørusølu. Harafturímóti fall sølan til útlendska marknaðin, serliga orsaka av lægri eftirspurningi sum fylgja av koronu. Rakstrarkostnaðirnir í samtakinum øktust við 6 mió. kr. til 185 mió. kr. Orsøkin er í stóran mun kostnaðir til umvæling av millumoyggjasjókaðlum, ið fingu skaðar av illveðri í fyrsta ársfjórðingi av 2020. Broytt sølusamanseting, øktir ráskostnaðir fyri sjónvarpstænastur og kostnaðir til innanhýsis menning eru somuleiðis orsøkir til hægru rakstrarkostnaðirnir.

Starvsfólkakostnaðirnir hækkaðu úr 97 mió. kr. til 103 mió. kr.

Rakstrarúrslitið áðrenn avskrivingar fyri 2020 gjørdist 102 mió. kr. samanborið við 109 mió. kr. árið fyri.

Avskrivingarnar vóru 66 mió. kr., sum eru 2 mió. kr. lægri enn í 2019.

Ársúrslitið eftir skatt hjá Føroya Tele gjørdist eitt avlop á 31 mió. kr. í 2020 samanborið við 33 mió. kr. í 2019.

### ÍLØGUR

Samtakið gjørdi í 2020 samanlagt íløgur fyri 119 mió. kr. í materiella støðisogn umframt 12 mió. kr. í immateriella støðisogn. Í 2019 vóru samlaðu íløgurnar 68 mió. kr.

### FÍGGJARVIÐURSKIFTI

Fíggjarstøðan javnvigaði við 766 mió. kr. 31. desember 2020. Við ársenda 2019 var javnvágin 711 mió. kr. Eginognin var til samans 530 mió. kr. við ársenda 2020 samanborið við 533 mió. kr. árið fyri.

Støðisognin til samans var 579 mió. kr. við ársenda 2020 samanborið við 515 mió. kr. við ársenda 2019. Av samlaðu støðisognini við ársenda 2020 vóru 541 mió. kr. materiell støðisogn. Ogn í umferð var 187 mió. kr.

Skuldin hjá Føroya Tele við ársenda 2020 var samanlagt 188 mió. kr. samanborið við 130 mió. kr. við ársenda 2019. Av samlaðu skuldini vóru 104 mió. kr. langfreistaðar tíðaravmarkingar.

### ÚRSLIT FYRI 2020

Eins og roknað varð við, hevði korona avbjóðandi umstøður við sær. Einamest vóru tað inntøkurnar og virksemið í frálandsvinnuni uttanlands, ið bleiv ávirkað. Hóast hetta, eydnaðist Føroya Tele samtakinum samanlagt at økja um inntøkurnar í 2020 samanborið við 2019.

Útreiðslur til umvælingar av millumoyggjasjókaðlum gjørdust óvanliga høgar í 2020. Harumframt vóru broytt sølusamanseting, øktir rásprísir fyri sjónvarpstænastur og menning av nýggjum virkisøkjum við til at leggja trýst á kostnaðirnar. Samanumtikið gjørdist úrslitið í 2020 lakari enn í 2019 eins og roknað var við.

### VINNINGSBÝTI

Nevndin mælir til, at eitt vinningsbýti á 32 mió. kr. verður útgoldið fyri fíggjarárið 2020.

### EIGARAVIÐURSKIFTI

Føroya Landstýri eigur allan partapen-ingin.

### ÚTLIT FYRI 2021

Framtíðarútlitini hjá Føroya Tele samtakinum eru framvegis tengd at óvissum í samband við koronu. Á sama hátt sum korona ávirkaði raksturin hjá samtakinum í 2020, verður raksturin í

2021 væntandi eisini í ávísan mun ávirkaður.

Í 2021 verður hildið fram við at menna inntøkugrundarlagið samstundis við, at talgildingin av samtakinum heldur fram. Menningin skal tryggja, at Føroya Tele framhaldandi kann veita enn betri produktir og tænastur. Samanumtikið metir Føroya Tele, at inntøkurnar verða hægri í 2021 og samlaða úrslitið betri samanborið við 2020.

## MERKISVERDIR TILBURÐIR EFTIR ÁRSENDA

Ongir merkisverdir tilburðir hava verið eftir ársenda í 2020.

# ÁTEKNING LEIÐSLUNNAR

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið ársfrásøgnina fyri 2020 fyri P/F Telefonverkið.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við galdandi føroyskar roknskaparreglur.

Harumframt meta vit, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøðir.

Vit meta, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2020 umframt av peningastreymi og úrslitinum av virksemi felagsins og hjá konsernini fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2020.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenning ársaðalfundarins.

Hoyvík, hin 25. mars 2021

## STJÓRN

Jan Ziskasen, samtaksstjóri

## NEVND

Bjarni Arnason, formaður

Levi T. Nybo, starvsfólkavaldur nevndarlimur

Johnni Poulsen, næstformaður

Ólavur Simonsen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

Annbritt Tummasdóttir Nielsen, nevndarlimur

Finnbjørn Simonsen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

Lena L. Mohr, nevndarlimur

# GRANNSKOÐANAR-ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

## TIL KAPITALEIGARARNAR Í P/F TELEFONVERKIÐ

## NIÐURSTØÐA

Vit hava grannskoðað samtaksroknskapin og ársroknskapin hjá P/F Telefonverkið fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2020 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, notum og peningastreymsuppgerð fyri bæði samtakið og felagið. Samtaksroknskapurin og ársroknskapurin eru gjørdir eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at samtaksroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av samtaksins og felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av samtaksins og felagsins virksemi og peningastreymi samtaksins og felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2020 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### GRUNDARLAG FYRI NIÐURSTØÐUNI

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av samtaksroknskapinum og ársroknskapinum". Vit eru óheft av samtakinum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV SAMTAKSROKNSKAPINUM OG ÁRSROKNSKAPINUM

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein samtaksroknskap og ein ársroknskap, ið geva eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera samtaksroknskapin og ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið samtaksroknskapurin og ársroknskapurin verða gjørdir, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt samtakið og felagið megna at halda áfram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein samtaksroknskap og ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so, at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka samtakið ella felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

### ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS AV GRANNSKOÐANINI AV SAMTAKSROKNSKAPINUM OG ÁRSROKSNKAPINUM

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at samtaksroknskapurin og ársroknskapurin sum heild eru uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør

sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í samtaksroknskapinum og ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í samtaksroknskapinum og ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni, eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera samtaksroknskapin og ársroknskapin grundað ároknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt samtakið og felagið megna at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í samtaksroknskapinum og ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at samtakið og felagið ikki eru før fyri at halda áfram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í samtaksroknskapinum og ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um samtaksroknskapurin og ársroknskapurin vísa transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

- Fáa vit neyðug og nøktandi grannskoðanarprógv fyri fíggjarligu upplýsingunum fyri feløgini ella handilsvirksemi í samtakinum, soleiðis at vit kunnu geva eina niðurstøðu um samtaksroknskapin. Vit hava ábyrgdina av at leiða, hava eftirlit við og fremja samtaksgrann-

skoðanina. Vit hava eina ábyrgd av okkara grannskoðanarniðurstøðu.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

## UMMÆLI AV LEIÐSLUFRÁGREIÐINGINI

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um samtaksroknskapin og ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av samtaksroknskapinum og ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og samtaksroknskapin ella ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við samtaksroknskapin og ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, 25. mars 2021

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
statsaut.revisor

# RAKSTRARROKNSKAPUR

1. januar til 31. desember 2020

| Nota | | KONSERN 2020 (t.kr.) | KONSERN 2019 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2020 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2019 (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|---|
| | Nettosøla | 389.488 | 384.597 | 43.587 | 48.235 |
| 1 | **Inntøkur tilsamans** | **389.488** | **384.597** | **43.587** | **48.235** |
| | Útreiðslur til vørunýtslu, fjarskiftis-tænastur og ráskostnaðir | -107.331 | -109.451 | - | -1.979 |
| | Annar rakstrarkostnaður | -75.099 | -66.563 | -16.375 | -15.057 |
| | Gjald fyri rakstur av Fjarskiftiseftirlitinum | -2.533 | -2.785 | - | - |
| | **Bruttoúrslit** | **204.525** | **205.798** | **27.212** | **31.199** |
| 2 | Starvsfólkakostnaður | -102.920 | -96.976 | -21.969 | -25.355 |
| | **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **101.605** | **108.822** | **5.243** | **5.844** |
